Jóhan Carl Dam:

# Felagið skal gerast meira opið



**Fyri Jóhan Carl Dam er tað avgerandi, at nógvar fíggjarligar betringar standa fyri framman. Alt ov nógv liggur á láni í Havnar Arbeiðsmannafelag, og tí hevur hann valt at royna at gerast formaður**

FORMANSVAL
*Heri á Rógvi*

- Felagið hevur verið alt ov afturlatið, og tað liggur alt ov nógv arbeiði á láni.

Hesi eru fyrstu orðini, ið Jóhan Carl Dam hevur at siga um orsøkina til, at hann hevur valt at stilla upp.

Sjálvur annar stillar hann upp til formansvalið í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann hevur sitið í nevndini seinastu tvey árini, men nú heldur hann, at tíðin er komin at fara í hægsta sess í felagnum.

Jóhan Carl hevur verið limur í Havnar Arbeiðsmannafelag í nógv ár. Seinastu nógvu árini hevur hann koyrt lastbil fyri Tórshavnar Kommunu. Hann hevur í fleiri ár verið álitisumboð hjá starvsfólkunum hjá landsins størstu kommunu.

Fleiri kenna hann óivað eisini frá ítróttinum, har hann hevur verið aktivur í HB - kanska serliga sum dómari í nógv ár.

Talan er um eitt lønt starv, at vera formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Vanligt hevur kortini ikki verið, at formaðurin sigur arbeiðið frá sær, ið hann hevur. Orsøkin er tann, at starvið sum formaður er tíðaravmarkað.

## Nóvar ætlanir

Jóhan Carl hevur sett sær fleiri mál, sum hann ætlar sær at virka fyri sum formaður. Øll heldur hann vera neyðug.

Talan um er bæði um internar broytingar og kanska serliga fíggjarligar broytingar.

- Fyri tann tímalønta er hvør króna týdningarmikil, og vit mugu skapa betri kor fyri okkara limir, sigur Jóhan Carl Dam.

Pengarnir, limirnir gjaldast inn, skulu geva størri avkast. Hetta skal gerast við, at pengarnir skulu setast í virðisbrøv ella annað, ið kann geva rentu.

Meira skal eisini fáast burtur úr eftirlønargrunninum.

Satsurin á yvirtíðini skal broytast, soleiðis at tey 35% verða broytt til tey 50. Á trygdarøkinum tosar Jóhan Carl um eina bráðfeingistrygdarskipan og betri útbúgving til álitis- og trygdarumboð. Tað er fatanin hjá Á Carl, at ein tílík trygdarskipan ikki nytist at gerast so dyr fyri felagið og limirnar.

Internt vil Jóhan Carl hava felagið gjørt meira opið.

- Felagið hevur verið alt ov afturlatið. Hetta hevur verið galdandi bæði fyri vanligar limir og nevndarlimir, sigur Jóhan Carl.

Hann nevnir sum dømi, at hann ikki hevur kunnað arbeitt á skrivstovu felagsins, men hevur gjørt alt fyrireikandiarbeiði í sambandi við felagið heima hjá sær sjálvum.

Sambært Jóhan Carl skal felagið gerast meira opið, limirnir skulu fáa størri kunnleika, og úteftir skal felagið vera meira sjónligt.

Somuleiðis hevur Jóhan Carl ta fráboðan, at limirnir í felagnum ikki hava verið behandlaðir eins.

Mín uppfatan er, at limirnir ikki verða behandlaðir eins. Munur verður gjørdur á eftirnøvnum og politiskum liti, sigur Jóhan Carl.

Somuleiðis er formansvalevni misnøgdur við, hvussu hann er vorðin behandlaður í sínum egnum felag í samband við valstríðið.

Sum heild metir Jóhan Carl, at felagnum tørvar stóran bata.

## Latið pappír

Valstríð hevur Jóhan Carl ført á tann hátt, at hann hevur verið runt um kring hjá teimum ymsu arbeiðsplássunum og latið nøkur skriv liggja, har hann greiðir frá, hvat hann stendur fyri.

- Tað er týdningarmikið fyri meg, at hetta valið verður avgreitt erliga og reiðiliga, og vit fáa eini demokratiska prosess, sigur Jóhan Carl.

Hann sigur seg ikki kunna siga, hvønn limirnir fara at peika á leygardagin. Hjá Jóhan Carl er valið eisini avgerandi átann hátt, at hann ætlar ikki at halda fram í nevndini, um hann ikki gerst formaður. Hann stendur fyri valið á aðalfundinum, men hann metir ikki nakra orsøk vera at halda fram, tá stevið í nevndini hevur verið so mikið vánaligt, eftir hansara tykki.

### Fakta

**Navn:** Jóhan Carl Dam
**Aldur:** 54
**Starv:** Koyrir lasbil hjá Tórshavnar kommunu
**Hjúnastøða:** Giftur og eigur tvey børn
**Í Havnar Arbeiðsmannafelag:** Verið limur síðani 16 ára aldur til nú. Virkin í nevndini í 2 ár.



# Byggja víðari á verandi grundarlag



**– Felagið hevur fingið eitt trygt og gott grundarlag frá undanfarnum leiðslum, og hetta sama grundarlag ætli eg mær at byggja víðari á, sigur Hans Joensen, ið roynir seg sum formansvalevni í Havnar Arbeiðsmannafelag**

FORMANSVAL
*Heri á Rógvi*

Hann hevur sjálvur annar valt at lata seg stilla upp til formansvalið í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Sum trettan ára gamal flutti Hans til Havnar úr Skopun. Hann gjørdist longu sum fjúrtan ára gamal limur í Havnar Arbeiðsmannafelag, tá hann fór í starv hjá Bacalao.

Hann starvaðist har nøkur ár og fór at sigla úti og var burtur. Í 1978 fór hann aftur í fast starv hjá Bacalao, og hann starvast í ár á 25. ári. Hann hevur øll árini fingist við at frysta slógv, sum verður selt sum minkafóður og útflutt.

– Tá núverandi formaðurin gjørdi av ikki at stilla uppaftur, so heitti fleiri á meg um at stilla upp, og eg haldi meg vera líka kompetantan sum onkran annan, sigur Hans Joensen, tá spurt verður eftir orsøkini til, at hann valdi at lata seg stilla upp til formansvalið.

## Fundamentið

Hans Joensen er glaður fyri felagið, hann nú ætlar at gerast formaður fyri. Hann er fegin um mátan, ið leiðslurnar seinastu árini hava rikið felagið.

Verður tað Hans Joensen, ið gerst formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, verður bygt víðari á sama grundarlag.

– Eg meti, at eg eri førur fyri at føra felagið á sama tryggja grundarlagið, sigur Hans Joensen.

Tá tosað verður um sama grundarlag í Havnar Arbeiðsmannafelag, so er einki at taka feil av, at tosað verður við støðið, Karl Johansen legði sum formaður í 25 ár.

– Vit hava eitt gott fundament, sigur Hans sannførandi.

Málini hjá Hans eru einføld og grein: At gera eitt gott umboð fyri felagið og limirnar. Arbeiðsleisturin fer at líkjast nógv tí, sum er, verður Hans Joensen formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Eg ætli mær at halda fram eftir verandi leisti, har farið verður hóvliga fram, sigur Hans Joensen.

Verður Hans valdur, so er hetta fyri eitt tvey ára skeið. Skipanin virkar á tann hátt, formaðurin verður valdur á aðalfundi, og limirnir greiða atkvøðu. Fyrr kundi stillast upp á fundinum, men soleiðis er ikki longur, og nú skulu uppstillingarnar latast inn skrivliga og áðrenn 1. januar. Aðalfundurin verður vanliga hildin á leið síðst í januar ella fyrst í februar.

Tað er tann greiða fatanin hjá Hans Joensen, at felagið, hann ynskir at gerast formaður fyri, hevur tað gott í løtuni.

– Støðan hjá felagnum er ógvuliga góð, sigur Hans.

Hann fegnast um áhugan fyri felagnum, sum hann heldur ikki minst skyldast, at felagið verður væl rikið, og limirnir kenna seg væl.

– Áhugin útifrá er stórur. Fólk vita, at hetta er eitt gott felag. Einki verður krógvað, og tað er gott skil á, sigur Hans Joensen.

## Einki valagn

Hóast hann velur at orða seg einfalt, so er tað ikki tí, at hann ikki hevur meiningar um nógv viðurskifti, ið viðvíkja felagnum.

– Eg havi mínar hugsanir, men tað er ikki alt, sum skal brúkast sum valagn, sigur Hans Joensen.

Tá hann sigur hetta, so sipar hann til, at hann ikki vil fara út og lova í eystur og vestur, men heldur beinini á jørðini, so hann eisini kann halda tað, hann lovar. Aðalmálið hjá honum er at arbeiða fyri limirnar.

Av somu orsøk sigur Hans seg hava gjørt sera lítið við at reka í sambandi við valið.

– Eg tosi sjálvandi við fólk, men eg havi ikki rikið nakað serligt, sigur Hans Joensen.

## Hevur stuðul

Sum er nýtir Hans nógva tíð til Havnar Arbeiðsmannafelag sum nevndarlimur. Serliga er tað, tá lønarsamráðingar eru á skránni, at tímar verða nýttir til felagið.

– Hetta arbeiðið geri eg út av áhuga. Tað er eisini áhugin, sum fær meg til at stilla upp til formanssessin, sigur Hans Joensen.

Greitt er, at Hans Joensen hevur stuðul frá einum parti av nevndini og úti í felagnum. Hvussu stórur uppbakningurin er um hansara persón, veit hann ikki fyrr enn leygardagin.

Verður Hans Joensen, verðuur leiðin hin sama, sum hon hevur seinastu árini. Hann hevur ikki kannar sær bitan, men hann er til reiðar at taka við ovastu leiðsluni í felagnum.

– Eg havi ikki lagt til merkist, at fólk seta so stór krøv. Sjálvandi ynskja fólk sær betri rúm at liva fíggjarliga, og hetta vilja vit støðugt arbeiða fyri.

Fólk hava nógv ynski og hugskot, men ikki alt ber til, og hetta verður so eisini ein uppgáva fyri meg sum møguligan formann at avgreiða, sigur Hans Joensen at enda.

### Fakta

**Navn:** Hans Joensen
**Aldur:** 51
**Starv:** Arbeiðir sum frystari á Bacalao. Hevur starvast har seinastu 25 árini
**Hjúnastøða:** Giftur og eigur fýra døtur
**Í Havnar Arbeiðsmannafelag:** Verið limur síðan hann var 14 ár. Í nevndini seinastu 6 árini

## Leygardagin verður aðalfundurin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag hildin, og tá er eisini formansval á skránni.

Jan Midjord ynskir ikki at halda fram sum formaður, men tveir aðrir bjóða seg fram. Teir eru Hans Joensen og Jóhan Carl Dam. Báðir sita í nevndini.

Sosialurin hevur hitt teir báðar á málið.

Havnar Arbeiðsmannafelag telist millum størstu fakfeløgini í Føroyum. Felagið var tað fyrsta, ið setti á stovn egnan eftirlønargrunn fyrst í áttatiárunum.

Formaður og ímynd felagsins í 25 ár var Karl Johansen. Hóast Hans ella Jóhan Carl skal avloysa virkandi formann Jan Midjord, so er tað í veruleikanum eftirmaður til Karl Johansen, ið verður funnin leygardagin.

Tað eru limirnir í felagnum, sum við hvør sínari atkvøðu gera av, um formaðurin í eitt tvey ára skeið skal eita Jóhan Carl ella Hans.

Formansstarvið í Havnar Arbeiðsmannafelag er lønt starv, men formaðurin hevur vanliga annað arbeiði eisini.

Karl Johansen andaðist í fjør. Hann kendi til sessin sum formaður betri enn nakar annar. Hin 13. oktober 2001 endurgav Sosialurin Karl Johansen fyri at siga:

„*Tað er ikki nemt at vera formaður. Beinanvegin tá okkurt gongur galið, so er tað tú, sum hevur skyldina*“